## Gestarøðarar

Um tríggjar vikur fer íslendski flokkurin Samfylkingin at halda ársfund, og nú er greitt, at tvær av fremstu javnaðarkvinnunum í Norðurlondum fara at hava orðið sum gestarøðarar. Talan er um formannin hjá Sosialdemokratunum í Danmark, Helle Thorning-Schmidt, og nývalda formannin í svenska javnaðarflokkinum, Monu Sahlin. Ingibjørg Sólrún Gísladóttir, formaður í Samfylkingini, var hjásrødd, tá Mona Sahlin varð vald til formann.

## Summarhús fyri 1 mia.

Ein verkætlan við einum frítíðarøki tætt við Legoland og flogvøllin í Billund hevur so stóran áhuga, at á einari sølustevnu um vikuskiftið keyptu fólk ikki færri enn 500 summarhús, sum verða partur av frítíðarøkinum. Prísurin fyri tey 500 summarhúsini er næstan ein mia. krónur. Harumframt eru 219 summarhús afturat umbiðin. Høvuðsmaður aftan fyri verkætlanina í Billund er kendi FCK-stjórin Flemming Østergaard.

# ur vegna húðarlit

kalla hann bæði líkt og ólíkt vegna húðalit sín.

Ungi maðurin verður sera illa við av hesum, og finnur seg als ikki í slíkum racistiskum úttalilsum. Hann mutar, sum vera man, ímóti, og greiðir teimum frá, at hann hevur eins góðan rætt at vera her í Føroyum sum teir.

Líkt er til, at hetta líkar ikki hesum trimum monnunum, og høvuðsmaðurin aftan fyri racistiska álopið fer nú beinleiðis yvir til unga manning, tekur í hann og førir hann yvir móti Tinghúsinum. Hagani verður hann víðari førdur oman móti stabbunum – og leinkjunum!! – inn móti Tinghúsvøllinum.

### Skavaður í andlitið

Samstarvsfelagararnir hjá høvuðsmanninum halda seg ikki aftur, og ta einu løtuna verður maðurin hildin fastur her og tvungin at boyggja seg afturav við andlitinum uppeftir.

Men høvuðsmaðurin er ikki liðugur við gerning sín. Hann kemur nú fram við einumhvørjum hvøssum luti, møguliga einum fløskubroti ella øðrum, og byrjar at skava í andlitið á dronginum. Talan hevur kortini ikki verið um knív, kann staðfestast.

- Hann føldi tað sum um teir skrivaðu bókstavir í andlit og enni hansara. Men tað er kortini einki sum týðir uppá tað, slær Bergleif Brimvík fast.

Hinvegin kann staðfestast, at ungi maðurin hevur fingið vatnrættar skurðir í ennið og nasaryggin, eins og hann hevur fingið fleiri loddrættar skurðir í vinstra kjálkan.

Umframt henda gerningin er maðurin sparkaður í klovan, og hevði bæði merki og rættiliga nógva pínu undir aðrari síðuni.

### Trýstur niður

Hóast ein skuldi trúð, at nú var sloppið hjá unga manninum, so var racisman ikki "sluppet op" fyri tað: Teir trýstu hann nú enn meiri niður, soleiðis at hann bóltaði inn á Tinghúsvøllin, samstundis sum teir talaðu háðandi og spottandi racistisk orð móti honum. Síðani fóru teir avstað.

Eftir lá so ungi maðurin, avhølvaður, skelkaður og einsamallur. Hjá honum var ikki annað at gera, enn at sleppa sær til hús, har tey annars høvdu hátíðardag fyri framman.

- Hann var so mikið skelkaður, at hendingin fyrst varð fráboðað okkum seinnapartin um dagin, sigur Bergleif Brimvík.

**Rasisma**
Tann hugsan, at ávís fólkasløg eru betri (mætari, fremri, sterkari o.s.fr.) enn ávís onnur

## Slíkur harðskapur er svínarí

Fyri Bergleif Brimvík er eingin ivi um, at slíkar hendingar als ikki eiga at koma fyri.

- Allur harðskapur er svínarí. Harðskapur av slíkum slagi er grovt svínarí, sigur leiðarin á kriminaldeildini.

Teir hava áður havt dømir um, at fólk eru vorðin niðurgjørd vegna húðalit sín. Men hetta hevur "bert" verið munnligur harðskapur – og ikki grovur likamligur harðskapur sum í hesum førinum.

- Slíkt hendir tíbetur ikki ofta her hjá okkum. Og tí vóni eg, at hetta bert er eitt einstakt mál.

- Tí vóni eg, at vit kunnu steðga hesum beinanvegin. Og at tann og teir sum hava gjørt hetta fáa sína revsing, sigur Bergleif Brimvík.

Revsiramman fyri slíkan harðskap er sambært grein 245 í revsilógini fýra ára fongsulsrevsing.

Men fyrstu má løgreglan fáa fatur á teimum seku.

# AI: - Sera álvarsamt rasismumál

**- Vit hava sæð hetta sama óhepna rákið innan føroyska fótbóltsheimin. Men tíbetur varð gjørt nakað við tað beinanvegin, sigur Margretha Nónklett, samskipari hjá føroysku deildini í Amnesty International.**

RASISMA
*Snorri Brend*

- Júst hetta at upplýsa um og basa rasismu, er eitt av aðalmálum okkara. Og hetta kunnu vit gera uppá nógvar ymiskar mátar, sigur AI-samskiparin.

Sjálv vil hon ikki gera viðmerkingar til eitt hetta einstaka málið. Men tey hava kortini staðfest, at eitt mál av líknandi slagi var frammi í fjølmiðlunum í fjør.

Tá var talan um ein útlendskan fótbóltsleikara sum føldi seg illa viðfarnan, eftir at ein mótleikari skuldi havt verið heldur harðligur í orð og talu undir einum fótbóltsdysti.

Tey í Amnesty kundu tó fegnast um, at ein júst innan føroyska fótbóltsheimin eru tilvitað um hetta rákið og viðgjørdu málið beinanvegin.

Hinvegin so er tað eisini ein veruleiki, at talið av fólki við øðrvísi húðaliti økist her á landi. Tí er neyðugt at ein lærir hin unga at vísa virðing fyri hesum menniskjum.

- Vit eiga tí at seta alt inn fyri at rasisma verður fyribyrgd og ikki vinnur fram. Henda tilvitanin kann gerast í skúlum, barnagørðum og á útbúgvingarstøðunum – og sjálvandi eisini í tí einstaka heiminum, so tíðliga sum gjørligt, sigur Margretha Nónklett.

*Hann føldi tað sum um teir skrivaðu bókstavir í andlit og enni hansara. Men tað er kortini einki sum týðir uppá tað*

*Løgreglan hevur áður havt dømir um, at fólk eru vorðin niðurgjørd vegna húðalit sín. Men hetta hevur "bert" verið munnligur harðskapur – og ikki grovur likamligur harðskapur sum í hesum førinum. - Slíkt hendir tíbetur ikki ofta her hjá okkum. Og tí vóni eg, at hetta bert er eitt einstakt mál.*

Áheitan frá pápanum:

# Sigið løgregluni frá

**Pápi 16 ára gamla drongin, sum var fyri racistiskum harðskapi sunnumorgunin, heitir inniliga á fólk, sum vóru vitni til tilburðin, um at ringja til løgregluna. - Annars hevur harðskapurin vunnið, sigur hann.**

RACISTISKUR HARÐSKAPUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Vit hava prátað við pápan at dronginum, sum var álopin í býnum sunnumorgunin.

Hann er sjálvsagt sera skelkaður av hendingini, og ikki minst er hann vónbrotin av, at fólk, sum hava sæð tilburðin, ikki lata við seg koma.

Pápin er ikki í iva um, at fólk hava sæð tað sum fór fram, tí nógv fólk eru í býnum um fimmtíðina sunnumorgun.

Hann leggur dent á, at familjan ynskir at vera anonym, tí tey sjálvsagt eru bangin fyri avleiðingunum, um tey standa fram.

- Teir, sum gera tílíkt eru púra blottaðir fyri empati. Hetta er vold og rasisma, og tað einasta rættsiktað fólk kunnu gera, um tey síggja slíkt, er at melda tað til løgregluna. Um vit lata tað fara óátalað fram, hevur harðskapurin vunnið, sigur pápin, sum bæði er keddur, óður og bangin av hendingini.

### Ikki fyrstu ferð

Hetta er ikki fyrstu ferð sonurin hevur verið fyri racistiskum harðskapi. Hinar ferðirnar hevur hann ikki vilja meldað, men hesaferð var álopið so ógvusligt, at tey valdu at fara til løgregluna. 16 ára gamli drongurin, sum er uppvaksin í Føroyum og hevur føroysk foreldur, er ongin harðskapsmaður, men var farin ein túr í býin, sum onnur ung fólk.

- Eg skilji bara als ikki, at vitni ikki ringja til løgregluna. Tí skal hetta vera ein innilig áheitan til fólk um at ringja til løgregluna hvørja einastu ferð tey uppliva slíkt. Annars verður støðan her á landi ein, sum vit ikki ynskja, tað er heilt vist, sigur pápi drongin, sum var fyri harðskapinum sunnumorgunin.